# Skemt



# Hjálp okkum!

Roze og Monaka eru pyntaðir, sum teir sjáldan hava verið. Teirra fegnu eigarar hava veruliga gjørt teir út til at evrða við í einum djóratiltakið nærindis Tokyo í Japan. Men altso, sær tað út, sum um teir tíma alt hóvastákið? Sær meira út, sum teir rópa um hjálp við teirra syrgnu eygum. Kanska eigararnir heldur skuldu verið lætnir í hasi klæðini.



## Skjótt koma tær á **café**

Vit menniskju eru kanska ikki so genial, sum vit ganga og halda okkum verða. Apurnar eru ikki so langt aftanfyri okkum – ella kanska eru vit ikki so langt frammanfyri. Her sæst ein apa fáa sær vant úr einum krana í Jammu í India. Ja, tað er væl bert ein spurningur um, nær apurnar koma á café at verða saman við okkum eisini.

## Vinir práta

- Konan hjá mær segði, at hun vildi ikki hava nakra føðingardagsgávu í ár, men helt, at vit heldur skuldu gera okkurt saman.

*- Gjørdu tit so tað?*

- Ja, vit skeldaðust um, hví eg ikki hevði keypt henni nakra føðingardagsgávu.

## Í RANGASTRÚPAN

**Hjálp!**
Fimm av klædnaatstøðingunum, sum fingu lovað eina trý ára útbúgving frá Tekniska Skúla í Havn, hanga nú í leysum lofti.
***Kringvarp.fo***

**Veldst um, hvar tú arbeiðir**
Tað krevur áræði at standa uppi og arbeiða
***Dimma***

**Manglar bara trífalt hurrá**
Tvífaldur ivi um málsøki
***Portal.fo***

**Tað verður einki vár í ár**
Várgleði 100 ár í mai
***Dimma***

**Teir eru helst fluttir niður – spæla í Danmark**
Føroyingarnir í Frem flyta helst niður
***Portal.fo***

**Byrja bara í løgtinginum**
Poul Michelsen fer eisini at Skimma
***Kringvarp.fo***

**Ja, veðrið er til tað!**
Jóladagar í Klaksvík í gjár
***Portal.fo***

**Sigur meira um kanningarnar enn veljararnar**
Hóast fáir veljarar halda, at ABC-samgongan skal halda fram óbroytt, so halda enn færri, at løgmaður skal útskriva nývál ella umskipa samgonguna
***Dimma***

**Hvat við at royna nýggjan taktikk?**
Nýtt graslíki á Argjum
***Portal.fo***

**Roykur á Taks**
TAKS gjørt rættiligt hál av smuglarasigarettum
***Kringvarp.fo***

**Nýskapandi list**
Rannvá við dustsúgvara og pensli
***Sosialurin***

## UMAFTURAFTURUM
### HØGNI DJURHUUS



# Royal jól í 11

Ikki tí, at tað hevði bjargað tjóðini, okkum fólkinum í Føroyum, verri enn so. Men tað hevði lætt um eitt sindur í hesum higartil tveimum rakárum.

Kann ikki onkur, sum hevur autoriseraðan statsgóðkendan myndugleika til at gera slíkt, senda hennara háting, Okkum Margretu, aðrari í røðini, ein gullrandaða emeyl við seyðarhøvdinum, Primeministers Office og Holm Johannesen og alt hatta har, og biðja hana og tey bíða við at koma til Føroya til fyrst í januar í 2012, ella á jólum í 2011. Tí tá noyðist ella sleppur samgongan frá kortini. Tey hava ongantíð hildið jól í Føroyum. Bara sent stutta heilsu nýggjársaftan.

Eygleiðarar og órein fólk siga, at samgongan fer frá eftir drotningarvitjanina.

Ikki tí at tað gjørdi nakað, um hendan sokallaða samgongan, sum nú er, leggur frá sær í summar í somu løtu reyvin á Dannebrog fer afturum Borðuna.

Hon er hvørki betri ella verri enn allar aðrar samgongur. Og eingin frægari er at taka við. Neyvan nøkur verri heldur. Tað nyttar til dømis einki, um Sambandsflokkurin einsamallur fær meiriluta í løgtinginum. Tí so má tað verða antin meirilutin í Sambandsflokkinum ella minnilutin í Sambandsflokkinum sum fær meirilutan í tinginum.

Og vilja vit endiliga hava hasa idiotisku parlamentarismuna, sleppa vit ikki undan samgongum og afturgongum. Sigast skal kortini, at okkara demokrati er dupult so gott sum demokratiið hjá øðrum, sum kalla seg demokrati. Tey sleppa bara at velja fjórða hvørt ár.

Aftur til royalu innrásina. Eingin eykajáttan fæst til asfalt nú í summar. Heldur ikki útreiðsluneutralt asfalt. Eisini ein góð orsøk til at bíða.

Eg ivist ongan veika løtu í, at drotningin og tey fegin vilja bíða til hetta valskeiðið endar á náturligan hátt. Tað ger teimum tað sama. Tey eru so væl fyri, at tey hava ikki loyvi til at hugsa um fólkaræði. Og so hava tey heldur ongantíð verið her um veturin.

Veit ikki, hvussu slíkar týðandi vitjanir koma í lag. Verða tey boðin, ella koma tey bara óboðin. Hetta er jú teirra ríki, so teimum nýtist neyvan at spyrja.

Tey eru so fólkaliga og fólkslig, at kanska bíða tey eftir einari innbjóðing:

"Kære dronning, det ville være positivt og samarbejdsvilligt, om I ville foretage en royal afledningsmanøvre her på Færøerne meget snart...." ella okkurt tílíkt.

Tey kunnu eisini koma longu í summar og "gloyma" (stundir vóru ikki til at blanka tær) at hava medaljurnar við, gull til løgmann, silvur til varaløgmann og bronsu til fíggjarmálaráðharran. Og so koma aftur í januar 2012.

Okkara móttøkukomité verður væl fyri í summar, væl hvíld. Nú røður fyrst og fremst um hjá løgtinginum at sleppa í summarfrí 12.mai, hóast tingsetan varar til 29.juli. Einki er sum ein long summarferia hjá teimum, sum hava eitt arbeiði at fara aftur til. Tí røður fyrst og fremst um at forða fyri, at drotningin kemur tvætlandi hendan vegin í summar við riddarum og krossum og ordanum og fortjenstmedaljum.

Og føroyingar, sambandsmaður og loysingarmaður, hava júst verið eina heila viku í trillrundum føðingardegi hjá Teimum.

Sambært álmanakkanum hjá løgmanni kemur drotningin 27.juni. Tað er ikki broytt enn. Elton John kemur 29.juni Hann átti at fingið eina tappurheitsmedalju fyri at kalla Jesus samkyning. Atgongumerki til Elton vóru enn at fáa fyrr í vikuni. Ókeypis atgongd er hjá VIPunum til sjóðið hjá drotningini.

Onkur, sum er á feysbukkuni, stovnar kanska ein bólk: Heindrikkur jólamaður í 11!